## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Andøvsgul upp í ein strúk av landnyrðingi og norði og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 3 og 6 stig, leygarnáttina um frostmarkið.




**Veðrið leygardagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av norði, um kvøldið lot av ymsum ættum. Yvirhøvur turt og sólglottar og hitin millum frostmarkið og +3 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Lot av ymsum ættum og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 2 og 5 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av suðri og mánadagin yvirhøvur turt, men týsdagin regn. Hitin millum 5 og 9 stig.

Vágatingmenn:

# Høga gjaldið má takast upp politiskt

**Vágatingmenninir Jóanis Nielsen og Marjus Dam eru samdir um, at gjaldið, ið P/F Vágatunnilin hevur ásett fyri at nýta undirsjóvartunnilin, er alt ov høgt og kann als ikki góðtakast. Tí noyðast politikararnir at leggja seg út í málið, siga teir**

BUMMGJALD
*Jón Brian Hvidtfeldt*



*Vágatingmenninir Jóanis Nielsen úr Fólkaflokkinum og Marjus Dam úr Sambandsflokkinum kunnu als ikki góðtaka høga gjaldið, ið P/F Vágatunnilin hevur ásett fyri at nýta undirsjóvartunnilin. Tí má málið nú takast upp politiskt, eru teir samdir um*

125 krónur hvønn vegin fyri ein persónbil. Hetta er prísurin, ið leiðslan fyri P/F Vágatunnilin hevur ásett fyri at nýta undirsjóvartunnilin. Harumframt eru tvær avsláttarskipanir, keypir tú eitt hald til fimm túrar, er kostnaðurin 100 krónur hvønn vegin, og keypir tú eitt 20 túra hald, er kostnaðurin 75 krónur hvønn vegin fyri bilin.

Hesin kostnaður er alt ov høgur, meta vágatingmenninir Jóanis Nielsen úr Fólkaflokkinum og Marjus Dam úr Sambandsflokkinum. Teir siga báðir, at tað kemur óvart á, at kostnaðurin er settur so høgt, bæði fyri persónbilar, men eisini fyri størri akfør.

Vágatingmenninir eru samdir um, at tað ber als ikki til at góðtaka kostnaðin, ið P/F Vágatunnilin hevur ásett, og tí má málið nú reisast politiskt.

- Vit hava eitt uppskot klárt, ið ásetur, at bummgjaldið skal bara fíggja tær 12-13 milliónirnar, ið Vágatunnilin skal gjalda í rentum og avdráttum uppá lánið, meðan raksturin av tunnlinum ikki skal gjaldast við bummgjaldið, siga Jóanis Nielsen og Marjus Dam.

### Fyrst takast upp í samgonguni

Jóanis Nielsen úr Fólkaflokkinum sigur, at hann fer at reisa málið í samgonguni beinan vegin fyri at vita, hvørt undirtøka er í samgonguni fyri at fara inn politiskt og broyta gjaldið.

Er ikki meiriluti fyri tí, so fer hann, saman við Marjus Dam, at leggja uppskot fram á løgtingi um at broyta gjaldið. Uppskotið hjá vágatingmonnunum snýr seg í stuttum um at bummgjaldið bara skal fíggja lánið uppá tunnilin, meðan landskassin skal fíggja raksturin av tunnlinum og aðrar útreiðslur í hesum sambandi.

Og sambandstingmaðurin í Vágum er somuleiðis til reiðar at leggja uppskotið fyri tingið beinanvegin.

- Vísir tað seg, at samgongan er til reiðar at koma við einum líknandi uppskoti, so er tað í lagið. Tað er ikki so umráðandi, hvør kemur við tí, men hetta er so avgjørt eitt mál, ið má takast upp politiskt beinanvegin, sigur Marjus Dam. Hann sigur, at hevur hann ikki fingið boð um annað áðrenn vikuskiftið, so fer hann, helst saman við Jóanis Nielsen, at koma við einum uppskoti at leggja fyri løgtingið.

Vágatingmenninir eru samdir um, at høga gjaldið fer at gera, at tunnilin av tí sama ikki verður so nógv nýttur, sum hann annars hevði verið, varð gjaldið sett lægri.

Teir vísa á, at skal ein persónur búgva í Vágum og arbeiða í Havn, so skal viðkomandi, um hann nýtir bíligastu avsláttarskipan, gjalda 36.000 krónur um árið, fyri at nýta undirsjóvartunnilin. Og tað er alt ov mikið, meta tingmenninir.

- Tað var jú endamálið, at tað skuldi bera til at búgva í Vágum og arbeiða í Havn. Men við hesum kostnaðinum verður hetta trupult hjá teimum flestu, siga Jóanis Nielsen og Marjus Dam.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | ÷5 |
| Nuuk | 1 |
| Qaqortoq | 2 |
| Ammassalik | ÷1 |
| Saint John's | 2 |
| Halifax | 13 |
| Reykjavík | 0 |
| Seyðisfjørður | 2 |
| Tórshavn | 7 |
| Lerwick | 8 |
| Aberdeen | 7 |
| London | 11 |
| Tromsø | ÷4 |
| Bergen | 3 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 1 |
| Keypmannah. | 7 |
| Helsinki | ÷5 |
| Moskva | 0 |
| Berlin | 10 |
| Warzawa | 9 |
| Kiev | 3 |
| Bukarest | 10 |
| Paris | 12 |
| Madrid | 14 |
| Róm | 18 |
| Malorca | 20 |
| Athen | 19 |
| Malta | 22 |
| Tunis | 23 |
| Beijing | 9 |
| New Dehli | 24 |
| Bangkok | 32 |
| Jakarta | 31 |
| Sydney | – |
| New York | 10 |
| Miami | 17 |
| Los Angeles | 19 |
| Meksikobýur | 16 |
| Panama | 24 |
| La Paz | 14 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 29 |

### LUFTTRÝSTIÐ




Eitt djúpt lágtrýst, 965 hPa yvir Írska Havinum fer í landsynning. Eitt hátrýst, 1020 hPa yvir Suður-Grønlandi mennist.




Lágtrýstið eystan fyri Skotland grynnist og hátrýstið yvir Grønlandsfjørðinum fer spakuliga eystureftir og verður væntandi yvir Føroyum sunnunáttina.

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 13/11 kl. 06⁰⁰– 14/11 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 6,0°
Minsti hiti máldur í nov.: ÷7,2° Mesti hiti máldur í nov.: 12,2°

### AVFALLIÐ




Avfallið: 13,0 mm – mált frá 13/10 kl. 06⁰⁰– 14/11 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í november: 126,0 mm

### VESTFALLSKYRRINDI

11. nov.: Fyrra kvarter
16. nov.: Mánin longst frá jørðini
20. nov.: Fullmáni

Kelda. Álmanakkin 2002

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | Suðuroyar-/ Vágafirði sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | Hestfirði/ Sundalagnum sp. | Vestmannasundi fp. | Vestmannasundi sp. | Mykinesfirði fp. | Mykinesfirði sp. | Nólsoyarfirði fp. | Nólsoyarfirði sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 15. nov | 03.20 | 15.39 | 02.20 | 14.39 | 02.35 | 14.54 | 05.20 | 17.39 | 06.20 | 18.39 | 01.35 | 13.54 |
| 16. nov | 03.58 | 16.17 | 02.58 | 15.17 | 03.13 | 15.32 | 05.58 | 18.17 | 06.58 | 19.17 | 02.13 | 14.32 |
| 17. nov | 04.36 | 16.55 | 03.36 | 15.55 | 03.51 | 16.10 | 06.36 | 18.55 | 07.36 | 19.55 | 02.51 | 15.10 |
| 18. nov | 05.14 | 17.33 | 04.14 | 16.33 | 04.29 | 16.48 | 07.14 | 19.33 | 08.14 | 20.33 | 03.29 | 15.48 |

| Dagur | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði sp. | Hvannasundi fp. | Hvannasundi sp. | Fugloyarfirði fp. | Fugloyarfirði sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 15. nov | 00.35 | 12.54 | 03.35 | 15.54 | 04.35 | 16.54 | 03.05 | 15.24 | 04.20 | 16.39 |
| 16. nov | 01.13 | 13.32 | 04.13 | 16.32 | 05.13 | 17.32 | 03.43 | 16.02 | 04.58 | 17.17 |
| 17. nov | 01.51 | 14.10 | 04.51 | 17.10 | 05.51 | 18.10 | 04.21 | 16.40 | 05.36 | 17.55 |
| 18. nov | 02.29 | 14.48 | 05.29 | 17.48 | 06.29 | 18.48 | 04.59 | 17.18 | 06.14 | 18.33 |

5 707265 100050 >